**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



TÍÐARGREININ
*Helena Dam á Neystabø*

# Tá ið politikkur blívur tað reina show – ella avtalað dupultspinn

Við jøvnum millumbilum stingur orðaskifti seg upp um fjølmiðlarnar sum fjóðra statsvaldið. Tað vil siga sum trygd borgarans fyri, at allar fjaldar dagsskráir verða avdúkaðar. Niðurstøðan í skrivandi stund er, at vit geva hvørki teimum privat fíggjaðu fjølmiðlunum og heldur ikki tí alment fíggjaða Kringvarpinum røttu arbeiðsumstøðurnar til tess.

Hin vegin eru umstøðurnar hjá fjølmiðlunum heldur ikki so ringar, at teir ikki áttu at sæð "spinnið" handan alt hetta tóma buldrið um at tiðna blokkin, sum setti dagskránna alla hesa vikuna.

Ein leystgangnadi hondgranat av einum fólkatingslimi brúkar endaorðaskiftið í Fólkatinginum til at biðja um meira blokkstuðul – eitt mál, sum hann sum fólkatingslimur absolutt einki hevur við at gera. Tað kann bara koma øllum føroyingum – eisini sambandsfólki – aftur um brekku, at vísa so lítla virðing fyri tí danska parlamentinum, at brúka tað til føroyskt sirkus. Og hví ger hann so tað? Jú fyri at fáa júst ta reaktión, sum han fekk, nevniliga at øll tann føroyska pressan leyp á leistum eftir hesum dukkufreti.

Einki annað mál, hvussu týdningarmikið og álvarsamt tað annars í veruleikanum er, megnaði at treingja ígjøgnum hesa ljóðdálking í vikuni sum fór. Og hin fólkatingslimurin helt seg sanniliga heldur ikki aftur. Endiliga eitt púra óforpliktandi propagandamál, sum hann visti, at pressan fór at halda á kóki í fleiri dagar. Sjónvarp og útvarp og hini - upp í saman. Og nú ið hann, á



102 - 2. juni 2009

**Tá øll á fólkatingi hugdu niður...**

HØGNI HOYDAL

**Blokkurin kann tiðnast aftur**

EDMUND JOENSEN

jøvnum føti við sambandsmannnin, fekk púra opna og fría mikroforn, brúkti hann sjálvsagt høvið at spæla plátuna um ómegd føroyinga og kúging dana av føroyskum sjálvræði, og harafturat at ákæra hesa somu glaðbeintu pressu, fyri ikki at geva sær og sínum pláss í fjølmiðlunum.

Tað ger formaðurin í Tjóðveldi ferð aftaná ferð. Átekur sær ein matýrleiklut. Ein taktikkur, ið sum frá líður er lættur at gjøgnumskoða. Og eftirhondini hevur hann endurtikið hesa søgu so ofta um, at andstøðan og serstakliga Tjóðveldi er so kúgað í pressuni, at sjálvt pressan, og hansara gomlu starvsfelagar har, eru farnir at trúgva honum. Og soleiðis setti Edmund og Høgni alla dagskránna farnu viku, grundað á - EINKI.

Henda lítla søga um sera væleydnað dupultspinn hjá Edmund og Høgna, sigur so mikið sum, at vit mugu menna teir føroysku fjølmiðlarna. Á ólavsøku skulu vit skifta orð um, hvussu tað alment fíggjaða Kringvarp Føroya skal skipast í framtíðini, og hvørji krøv, ið vit eiga at seta teimum, og hvussu tað skal fíggjast – og tað skal vera mín vón, at leikluturin hjá privatu pressuni verður viðgjørdur í sama viðfangi. Og at vit semjast um eina javnvág, har rúm er fyri øllum.

Tí báðir leikarar mugu vera á vøllinum, og teir mugu fáa stundir og náðir til at fara eftir teimum veruligu tíðindunum, og ikki bara gloypa teir bitar, sum tey, sum sita við valdinum, blaka fyri teir.

**Tíðargreinin**



## Grønlandstíðindi

Kári við Stein

# Kári við Stein: Heilsaði uppá Hákun krónprins

**Kári er aftur við nýggjum tíðindum úr Grønlandi. Her hevur verið vitjan av trimum trúnfylgjarum, og tað gongur væl við rognkelsisveiðuni**

**18. mai**
Í dag + 4 stig og stilli. Qaqqatsiaq kom inn í morgun at landa og skifta fólk. Tað er stutt síðani, teir vóru inni her og landaðu. Hesa ferð hava teir gott 260 tons inni. Polar Assik er inni í Aasiat og landar. Har er alt fult bæði kør og kassar, gott og væl 65 tons. Teir hava fiskað um 190 tons í tríggjar túrar.

**19. mai**
Í dag er lot av suðri og + 2 stig. Natarnaq kom inn í morgun at landa. Teir hava gott 380 tons inni. Qaqqatsiaq loysti í nátt til nýggjan túr.

**20. mai**
Í dag er + 5 stig og stilli. Lómur er komin til Illulisat at landa í morgun. Teir hava um 125 tons inni eftir fiskarí í trý samdøgur. Teir sleppa ikki út aftur fyrr enn í morgin nýggjan túr. Nataarnaq loysti í morgun kl 7 til nýggjan túr.

**25. mai**
Í dag er dýrdarveður, + 7 stig og val av norðanvindi úti á. Polar Aassik kom inn til Aasiat at landa í morgun. Teir hava fulla last inni.



*Kári við Stein heilsar uppá norska krónprinsin Hákun Magnus*

**26. mai**
Í dag er +1 stig og eitt kalt lot. Lómur kom til Illulisat í morgun vid fullum skipi, úti við 140 tonsum. Síðani teir byrjaðu hetta tørnið hevur Lómur fiskað yvir 800 tons av rækjum. Harav hava teir mist eina heila viku í liggidøgum eftir boðum frá rækjuvirkinum. Tað er nokk bara her hjá okkum, at virkini ikki vilja hava rávøru og lata aftur, sum teir vilja.

**27. mai**
Í dag er dýrdarveður og +7 stig. Mitt í øllum var kongalig vitjan her í býnum. Tað var okkara krúnprinsur Frederik, tann svenska krúnprinsessan Victoria, og so tann norski krúnprinsurin Hákun. Eg var so heppin at heilsa uppá tann norska Hákun. Eg helt, at vit skuldu hava tað eitt sindur stuttligt báðir, so eg bjóðaði honum vælkomnan til høvuðsstaðin í Grønlandi, Sisimiut. Hann takkaði fyri, og so segði eg í skemti vid Hákun, at eg var ein føroyskur víkingur líka sum tú Hákun er ein norskur víkingur. Tað tók hann væl ímóti, so vit smíltust báðir eina løtu. Í kvøld ringdu fleiri til mín og takkaðu fyri reklamuna fyri Sisimiut. Tað vísti seg, at hetta var eitt av innsløgunum í grønlendsku TV-Avisuni, uttan at eg visti av. Hevði eg vitað, at eg var í TV, so skuldi eg billa Hákuni inn, at tá eg gekk í skúla sum smádrongur, lærdi vit, at norðmenn vóru avkom av teimum føroysku vikingunum. Um hann var í iva kundi hann tosa við okkurt Vikingasavn í Noreg um tað var rætt. Men ein tiltalandi persónur, tað var og er hann, tað er heilt vist.

Ocean Tiger er í Nuuk og leggur upp rækjur, sum teir hava við úr Eysturgrønlandi. Soleiðis er lógin fyri teir, tí tað er EU-kvota, sum teir hava fiskað av.

**29. mai**
Í dag er stilli. Í morgun var komið nakað av hvítum niður, og tað eru 0 stig. Grønlendska útvarpið segði í dag, at Artic Prime hjá Hanus Hansen og Kim Høeg Dam høvdu fingið endaligt loyvi at taka ímóti ísaðum toski frá bátunum, og at ein línubátur var á veg um 10 dagar. Har skuldu vera tvey hold umborð uppá 14 mans til hvørt holdið. Virkini í Nagtoralik og Qarotoq roknadu við at kunna hava arbeiði til 100 fólk alt árið. Tað bleiv sagt, at virkið í Qarotoq var einasta virki í landinum, sum gjørdi lidnar vørur líka til diskin.

Tað er sagt í grønlendska sjónvarpinum, at tað var nógvur toskur í botngørnunum, og at fiskurin er vaksin eitt lítið sindur. Men teir sleppa bara at avreiða 700 kilo av avhøvdaðum fiski á 4 kr kilo. Tað gevur litið til avlops.

Virkið, sum tekur ímóti her, er Sisimiut Food. Stjórin Hanseraq Enoksen segði frá, at tað var ein undirskotsforrætning hjá teimum, sum keyptu rundan fisk. Tá fiskurin fór av landinum fingu teir 7 kr fyri kilo. Tað lønti seg betur at salta fiskin, har var prísurin betri.

Rognaveiðan er betri nú, enn hon hevur verið. Lýkkan gjørdi nógvan mun hjá teimum, sum royna eftir rognkelsum. Teir fáa 17 kr fyri kilo av rognum. og tað er um 1 kilo av rognkelsi í hvørjum fiski. Bátarnir koma við 1-2 plasttunnum og avreiða. Tað ganga gott 100 kilo í tunnuna. Tað er munur á rognaprísum. Um eg keypi eina dós av rognum her, so kostar hon 22-25 kr. Eg hugdi, nú eg var í Danmark herfyri, í ein fiskahandlaraglugga.

Har lá ein dós av fronskum kaviar fyri 599 kr. Gud viti, hvat fyri fiski tey rognini eru av. Har seldu teir tosk fyri 89 kr kilo, og ikki at forgloyma toskaflak fyri 170 kr kilo. Onkur skovlar pengar inn, tað er heilt vist. Søgur siga, at í Nuuk er prísurin á toski 6 kr kilo